# Simme Musikkhús tænt tónleikinum í nærum hálva øld

**Komandi ár fyllir Simme Musikkhús runt, og hóast eigaraskifti er farið fram , so er The Grand Old man – Simme – enn eitt sindur við, og fyritøkan er enn í fremstu røð og kennir tónleikarar í øllum aldri**

Simme Jacobsen er av sonnum the grand old man, tá tosað verður um føroyskan tónleik. Síðani 50'ini hevur hann verið tónleikari, og var felagsnevnarin innan tónleikaframførslu í Havn í mong, mong ár. Tá útvarp kom í fimmtiárunum var hann við og tá Útvarpið sendi V4 skemt og tættir í sjeyti- og partvís áttatiárunum, so var Simme við. Og tað hendir seg enn, at hann fer á pall.

Í 1959 setti hann Simme Musikkhús á stovn, og fór undir at selja ljóðføri, og fyritøkan fyllir sostatt runt komandi ár.

### Bjarnastein

Tað eru nú 4 ár síðani, at Magnus Bjarnastein kom við í fyritøkuna. Fyri trimum árum síðani yvirtók hann alla fyritøkuna, men síðani hevur Simme fingið harmonikurnar aftur at umboða og umvæla. Nakrar harmonikur verða eisini sýndar fram í handlinum í Havn, so enn hevur Simme líkasum ein fingur við í spælinum.

Magnus var frammanundan yvitøkuni av Simma Musikkhúsi kendur sum guitarbyggjari og hann framleiðir enn kendu Bjarnastein guitararnar.

Magnus Bjarnastein hevur flutt verkstaðin í størri og betri hølir, so nú kann hann eisini gera størri umvælingar.

Guitarbyggjarin hevur eisini júst lagt síðstu hond á enn ein Bjarnastein guitar, so byggivirksemið heldur á, hóast hann nú eisini fæst við keyp og sølu og umvælingar, sum eigari av Simma Musikkhúsi.

### Fylgir teim ungu

Magnus Bjarnastein sigur, at úrvalið er sera breitt, og at hjá Simma, sum tað eitur millum manna, hava tey nógv at bjóða og innan øll tey vanligastu ljóðførini.

Hjá Simma koma bæði leikfólk og professionellir tónleikarar, umframt umboð fyri skúlar og aðrar stovnar, og hjá Simma eru tey til reiðar at hjálpa og ráðgeva.

Hann sigur eisini, at tað er stuttligt at fylgja við, tá yngri tónleikarar koma innar.

- Hóast eg nú bert havi verið við her í 4 ár, so síggi eg longu onkran, ið kom inn sum ungur og ókendur, men sum longu nú hevur vunnið sær veg fram, sigur Magnus Bjarnastein.

### Útvegar tað mesta

Hóast nærum hálva øld á baki, so hevur fyritøkan Simme Musikkhús við eigaraskiftinum tryggjað, at handil, verkstaður og søguliga bandið aftur í árini, tá rockurin og poppurin byrjaði, eru varðveitt til ættarlið, ið koma.

Magnus Bjaranstein sigur, at fyritøkan hevur mong merkir, men at sjálvsagt verður dentur lagdur á nøkur, alt eftir hvat ljóðføri talan er um, men Simme Musikkhús kann útvega tað allar mesta, ið er til at fáa hendur á.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Nýggjasti Bjarnastein guitarin, ið júst er komin av verkstaðnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*
















